# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er ikki á hvørjum degi, at ein forseti í Afrika verður skúgvaður til viks eins og Thabo Mbeki í gjár*

*(eygleiðari)*

# Lógu hjálparleys í tímavís

**Ikki fyrr enn fýra tímar aftan á tokvanlukkuna í Pakistan komu tey fyrstu bjargingarliðini á staðið**

- Eg veit ikki, hvat hendi, men alt í einum skalv tokið. Vit duttu, og so bleiv myrkt inni, og soleiðis lógu vit í næstan fýra tímar og bíðaðu.

Mohammad Iqbal var millum ferðafólkini í snartokinum til Karachi tíðliga í morgun. Sjálvur fekk hann ikki stórvegis skaða, men hann minnist væl neyðarrópini í myrkrinum.

Fólk í einari bygd nærhendis varskógvaðu myndugleikarnar, men kortini gingu næstan fýra tímar, áðrenn tey fyrstu bjargingarliðini komu á staðið. Tað vísti seg, at 14 av teimum 18 vognunum vóru farnir av jarnbreytini, og at fleiri teirra vóru í sori. Fyrrapartin vóru 58 fólk funnin deyð í vognunum, og umleið 120 vóru flutt á sjúkrahús.

Pakistonsku myndugleikarnir vóru skjótir at siga frá, at talan var ikki um yvirgang, men at eitt brek við jarnbreytini hevði gjørt, at snartokið fór útav. Sambært Reuters er jarnbreytin, sum snartokið koyrdi eftir, løgd í 1930-árunum, og viðlíkahaldið hevur verið tilvildarligt.



*Fleiri av teimum 18 tokvognunum fóru í smildur, tá teir fóru útav*

*Mynd: Reuters*

# Hetja teirra fátæku vann

**Hóast skuldsetingar um svik og neyðtøku vann Jacob Zuma greiðan sigur á formansvalinum í suðurafrikanska ANC**

Við 2.329 takvøðum ímóti 1.505 vann Jacob Zuma formanssætið í ANC frá Thabo Mbeki, forseta, og um smá tvey ár vinnur hann ætlandi eisini forsetasætið í Suðurafrika.

Jacob Zuma var varaforseti í Suðurafrika, men noyddist frá, tá hann bleiv lagdur undir svik. Hann var eisini skuldsettur fyri at hava neyðtikið eina 31 ára gamla HIV-smittaða kvinnu, men løgreglan slepti málinum, tí hon kundi ikki prógva, at talan var um neyðtøku.

Tað er sagt um nýggja formannin í ANC, at hann hevur møtt so stórari mótstøðu á sínari politisku virkisleið, at næstan allir aðrir høvdu slept politikkinum og funnið sær okkurt annað at takast við. Hansara verumáti ger, at annaðhvørt elska fólk hann, ella hata tey hann, og tí hevur hann bæði vinir og fíggindar í ANC.

### Á Robben Island

Uppstillingin upp undir formansvalið vísti týðiliga, at tann fátæki parturin av suðurafrikanska fólkinum vildi hava Jacob Zuma at taka við eftir Thabo Mbeki.

- Hann er sum vit, og í honum síggja vit ein, sum vit kunnu tosa við, og sum veruliga elskar sítt fólk, segði ein talsmaður hjá einum fátækrafelagsskapi.

Tann 65 ára gamli Jacob Zuma hevur verið limur í ANC síðani 1958. Í 1963 varð hann settur í fongsul, og tey næstu tíggju árini sat hann í fongsli á Robben Island saman við Nelson Mandela. Í tólv ár hevur hann búð í útlegd í Mozambique, Swazilandi og Zambia.

Nú er hann formaður í ANC og í 2009 ætlandi suðurafrikanskur forseti.



*Thabo Mbeki (vm.) ynskir Jacob Zuma tillukku við formansstarvinum*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Vilja hava Alexandru

Fleiri deildarformenn hjá Reyða Krossi í Danmark taka undir við einum hugskoti um at velja Alexandru, greivinnu og fyrrverandi prinsessu, til aðalskrivara eftir Jørgen Poulsen, sum er vorðin fólkatingsmaður, og sum tí ikki kann halda fram í Reyða Krossi. Preben Bansemer, sum er formaður í deildini hjá Reyða Krossi í Brøndby, sigur við danska útvarpið, at Alexandra hevði verið tann heilt rætti persónurin til starvið sum aðalskrivari, tí hon er nógv avhildin millum danir. Haraftur at hevur hon víst, at hon megnar krevjandi uppgávur.

### Grovt valsvik

Óhefti eygleiðarafelagsskapurin Transparency International sigur í einari frágreiðing, at tjóðartingsvalið í Russlandi fyri stuttum var merkt av umfatandi valsviki. Tað sama hevur russiski eygleiðarafelagsskapurin Golos sagt. TI skrivar í frágreiðingini, at tað finnast dømi um, at túsundtals atkvøðuseðlar við krossi við flokkin hjá Vladimir Putin, forseta vórðu koyrdir í atkvøðukassarnar ísenn, og at tað vóru ikki veljarar, sum høvdu sett krossarnar. Flokkurin hjá Putin fekk 64 prosent av atkvøðunum. TI og Golos vilja vera við, at fleiri embætismenn fingu sekkin, tí teir megnaðu ikki at útvega flokkinum hjá forsetanum nóg nógvar atkvøður.

### Hvalir við húgvu

Í einum japonskum djóragarði hava tey givið nøkrum hvíthvalum jólamanshúgvu á kúluna, og tað halda tey flestu vitjandi vera stuttligt. Men djóraverndarfelagsskapir eru í øðini, tí eftir teirra tykki er hetta at niðurgera hvalirnar. Tað ger ikki støðuna betur, at hetta hendir í einum landi, sum er fyri hvøssum atfinningum kring heimin, tí japonsk hvalaskip framvegis brúka harpun til stórhvalaveiði í Suðurhavinum. Harafturat hava japanar gjørt av at veiða nakrar kúlubøkur í ár, sjálvt um tær hava fingið frið tey seinastu 40 árini. Tann nýggja stjórnin í Avstralia hevur boðað frá, at hon fer at hava eitt vakið eyga við japonsku hvalaskipunum.